# Vestmenningur er góðkendur í eitt ár

***Kappróður:** Á aðalfundinum hjá Róðrarsambandinum komandi heyst er ætlanin at góðkenna nýggj mát fyri allar bátastøddir*

Róðrarsambandið hevur gjørt av, at tað í hesum árinum skulu fáast neyvari og greiðari ásetingar um, hvørji mátini skulu vera, sum skulu haldast fyri at fáa ein kappróðrarbát góðkendan til FM róður.

Spurningurin um mátini gjørdist bransaktuellur, tá umboð fyri Róðrarsambandið fyri nøkrum vikum síðani vóru í Vestmanna og máldu nýggja 10–mannafarið, Vestmanningin. Tá vísti tað seg, at í ávísum førum vóru mátini ikki tey, sum eru ásett í ásetingunum hjá RSF.

– Vit viðgjørdu spurningin, og tað skal ikki vera nøkur loyna, at í nevndini var tað stemningur fyri ikki at góðkenna bátin. Men áðrenn endalig avgerð varð tikin, vóru vit í sambandi við løgfrøðing, sum vísti á, at tað ikki fór at bera til at kolldøma ein bát, tí hann ikki helt mátini, og samstundis at vera greiður yvir, at fleiri av bátunum, sum áður eru góðkendir, halda ikki kravdu mátini. Vit tóku niðurstøðuna hjá løgfrøðinginum til eftirtektar. Tað snýr seg í hesum førinum ikki um, at ein bátur víkur uppaftur meiri frá ásettu mátunum, enn aðrir bátar gera, men tað snýr seg um prinsippið, at bátarnir ikki lúka mátini.

Hetta sigur Hannis Joensen, formaður í Róðrarsambandinum. Hann leggur afturat, at í RSF er semja um at arbeiða fram ímóti, at tað á aðalfundinum, sum verður síðst í oktober, skal leggjast eitt nýtt uppskot um mát á kappróðrarbátum.

– Hetta verður eitt stórt arbeiði at gera, men vit miðja ímóti, at tað skal vera liðugt undan ársaðalfundinum. Longu frammanundan, at tað kom undan kavi, at nýggi Vestmenningurin ikki heldur mátini, høvdu vit tik9ð avgerð um at seta eina nevnd at kanna bátarnar og síðani at koma við uppskoti um nýggj mát. Nevndin er ikki endaliga sett, men vit hava heitt á persónar, sum hava havt nógv við uppmáting av kappróðrarbátum at gera, um at vera í nevndini, upplýsir Hannis Joensen.

Róðrarsambandið hevur heitt á Andrass Joensen um at vera formann í nevndini. Andrass Joensen er skipstimbrari, og hann hevur frammanundan gjørt nógv við at máta bátar upp, m. a. í samstarvi við Forngripasavnið. Harafturat hevur RSF heitt á bátasmiðirnar Sámal Hansen, Kaj Hammer, Jóan Petur Clementsen og Magna Nielsen um at vera við í arbeiðnum. RSF ætlar at eitt umboð fyri Róðrarsambandið skal vera skrivari í nevndini.

### Krøvini

Longu á aðalfundinum hjá ÍSF, sum tá hevði við allar ítróttarkappingar at gera, var tað samtykt hin 28. november í 1959, at bátar, sum tóku lut í kappróðri, skuldu standa ávís mát.

Talan er um fleiri mát: longd, mát sjey føtur framman fyri hálva longd, mát á hálvari longd, mát sjey føtur aftanfyri hálva longd og bakrongin frá stavninum oman enniknæ til fremst á rongini miðskeiðis.

– Vit hava leingi verið greiðir yvir, at nógvir bátar ikki lúka øll mátini, sum eru fyriskrivað í reglunum. Tá Sámal Hansen fyrireikaði seg til at fara undir at smíða fyrsta bátin, sum var Kjølur, máldi hann bátarnar, sum Niclas í Koltri hevði smíðað. Talan var um síðstu 10–mannaførini hjá Niclasi. Tey eru Skálbáturin, Nólsoyingurin og tann Eysturoyingurin, sum var frammanundan tí, ið kom fyri tveimum árum síðani.

– Tá kom Sámal eftir, at fleiri vóru longri, enn tað er fyriskrivað, og tað boðaði hann okkum frá. Síðani hava vit fingið fleiri áheitanir um at gera nakað við uppmátingina, og nú verður farið undir arbeiðið. Um tað verður liðugt og eitt endurskoðað upskot lagt fyri aðalfundin í heyst, fáa vit at síggja til ta tíð, men tað verður miðjað eftir hesum, sigur formaðurin í RSF.

Tey, sum hava skil fyri tí, siga, at tað ber illa til ella als ikki til at halda øll tey mátini, sum eru fyriskrivað, og tí eiga tey at verða laga eftir tí, sum ber til.

### Vestmenningurin

Trupulleikin við Vestmenninginum er tað longdarmátið, sum eitur millum reisingar 12 tummar omanfyri yvirtrom á kjøli. Í ásetingunum verður sagt, at mátið skal ikki vera yvir 12 alin og 2 tummar. Eysturoyingur og trý av teimum nýggju 10–mannaførunum eru 12 alin og fýra tummar. Vestmenningurin er 12 alin og sjey tummar.

– Tá vit eru 12 tummar oman yvirtrom á kjøli, eru vit rættuliga nær vatngangínum. Tess longri mátið er, tess betri rennur báturin. Tí er tað óheppið, at ikki allir bátarnir hava sama mát. Men nú ætla vit at gera nakað við hetta. Og so kann tað hugsast, at onkur feløg í heyst fáa at vita, at tey skulu stytta sínar bátar, staðfestir Hannis Joensen.

JH

# Ríða á Leynarvatni

*Leygardagin verður ríðistevna við Leynarvatni*

Leygardagin 3. juni skipar Føroya Ríðingarfelag fyri fyrstu FM-kappríðingini í ár. 55 ross taka lut. Kappríðingin byrjar kl. 18.00. Kl. 22.00 verður legubál við felagssangi, har høvi verður at steikja pylsur. Kl. 24 verður dansur á sandinum, har orkestrið Moonshot spælir. Á stevnuni verður søla av mati og drekka. Bussar koyra úr Vestmanna á midnátt til Leynavatn. Koyrt verður gjøgnum Kvívík.

Bussur koyrir úr Kollafirði kl. 0.30. Eisini úr Havn koyrir bussur kl 01.00 frá City til Leynavatn. Koyrt verður frá Leynavatni aftur til Havnar og Kollafjarðar kl. 4.30 og til Vestmannar kl. 5.30.

# Andrew dagsins maður

*Løgmassteypið: HB at kalla tryggjaði sær finalusessin, tá teir vunnu stórsigur á VB í fyrru hálvfinulini*

Jákup Mørk

Eingin ivi er um, at Andrew av Fløtum varð dagsins maður í Gundadali dýra biðidag. Við fýra málum og hini bæði HB-málini, var hann meira enn nakar annar maðurin aftan fyri stórsigurin, og kanska kann hetta eisini verða viðvirkandi til, at hann sleppur hægri í metum millum fótbóltsáskoðararnar.

### Æviga »talentið«

Síðani hann fyri fyrstu ferð terin inn á fyrstudeildarpallin her heima, í 1996, hevur so at siga verið bíðað eftir, at hann fór at fáa sítt endaliga gjøgnumbrot.

At fótbóltsevnini eru í lagi, er eingin ivi um, men hinvegin hevur hann nú í eini fýra ár borið heitið, talent, uttan at hann hevur megnað at bitið seg fastan á annan álopssessin á besta HB liðnum.

Um dysturin móti VB var eitt tekin um, at hetta nú er broytt, ella um talan bert var um eitt upplop, skal ikki verða staðfest her, men ábendingar eru í øllum førum um, at »talentið« er um at verða vaksin.

### Einvegis ferðsla

Sjálvandi var Andrew ikki einsamallur um stórsigurin. Í fyrra hálvleiki sýndi HB liðið so nógv tað besta spælið, teir hava havt higartil í ár. Nølaríið og rullanin upp á tvørs, var brádliga skift út við beinleiðis og ágandandi álopsfótbólt.

Tá VB so samstundis framdi at kalla eina sjálvmorðsroynd, við at spæla við flatari verju, so kundi tað bert ganga sum tað gekk.

Stórsigurin varð grundlagdur fyrstu innan 10 minuttir, har HB skoraði trý mál, og eftir hetta var at kalla einvegis ferðsla, har heimaliðið við kvikum samanspæli spældi ørkymlaðu VB leikararnar niður og norð.

Fyrsta málið kom, eftir at Rúni hevði fingið bóltin í høgru síðu. Hann sendi ein skrúvandi bólt inn um fløtu VB verjuna, har Andrew fekk sníkt seg fram um tríggjar verjuleikarar, og sneiddi Bjarna av, áðrenn bólturin varð lagdur í málið.

Níggju minuttir seinni var Andrew aftur upp á spæl. Fyrst royndi hann at bróta ígjøgnum VB-verjuna, men tá hetta ikki eydnaðist, sendi hann ístaðin álopsfelagan, Jón Róa, avstað í høgru. Jón Rói framdi allarhelst fríspark, tá hann skumpaði verjuleikaran burtur, men í øllum førum gjørdist hann púra leysur, og kundi senda bóltin millum beinini á málverjanum.

Minuttin eftir vann Rúni bóltin á miðjuni, og eftir at hava snýtt verjuleikara, varð bólturin í einum bleytum boga sendur upp um Bjarna, sum ikki hevði ein livandi kjans at gera nakað við bóltin.

### Einfalt og vakurt

VB royndi at umskipa liðið nakað, soleiðis at Tórður og Jón Pauli fingu meira sentralar leiklutir, men tað var einamest við deyðbóltsstøðum, at gestirnir vóru vandamiklir.

HB liðið helt tó áfram við ágangandi spælinum, og í 38. minutti varð aftur galið. VB verjan snorksvav, tá Rúni tók stutt fríspark til Róa. Við eini væl sæddari sending, spældi hann bóltin fyri føturnar á Andrew, sum tók eitt trekk, áðrenn hann langaði bóltin upp undir nettakið.

Stutt eftir hevði VB møguleika at minka um munin, tá Jón Pauli varð feldur í brotsteiginum, men leikandi venjarin (sum eisini misnýtti móti HB í fjør) skeyt bóltin á stólpan.

Ístaðin kundi Rúni Nolsøe økja um leiðsluna til 5-0, tá hann sjálvur vann bóltin á miðvøllinum, sendi Andrew avstað, og síðani sjálvur rann seg púra leysan at avgreiða bóltin, tá Andrew sendi inn um aftur. Einfalt, vakurt og effektivt.

### Stórsigurin kom í vanda

Í seinna hálvleiki setti HB ferðina nakað niður, og hóat hetta kanska tykist náttúrligt, tá leiðslan er somikið trygg, so kundi hetta lættliga kosta stóran part av leiðsluni.

VB liðið royndi nevnliga alla tíðina at trýsta HB liðið, og longu níggju minuttum gav hetta úrslit. Leikandi venjarin varð sendir avstað í høgru, og eftir at hava snýtt verjuleikara, sendi hann bóltin í málið.

Lítla løtu seinni var Krzystof aftur upp á spæl. Eltir af trimum HB leikarum, megnaði hann kortini at sleppa sær inn um brotsteigin, áðrenn hann lat seg detta, og so kundi Milan minka munin niður í trý mál. HB leikararnir tóktust ónøgdir við dómin, og kanska var tað rætt, at brotið móti Krzystof varð framt uttan fyri brotsteigin, men hann megnaði so at fóta sær nakrar metrar afturat. Hinvegin skulu havnarmenninir vera glaðir um, at Niklas, sum annars dømdi sera væl, ikki sá, hvør av HB leikarunum framdi brotið.

At síggja varð venjarin togaður av Janusi, og tá hesin hevði fingið gult í samband við fyrra brotssparkið, kundi talan lættliga verið um reytt hesuferð.

VB sá nú møguleika fyri at minka um munin, so returdysturin kanska kundi gerast rættuliga spennandi, men hóast teir royndu at trýsta, so gjørdist talan ongantíð um teir heilt stóru møguleikarnar.

Hetta opnaði eisini fyri kontramøguleikum hjá heimaliðinum, og tá fimm minuttir vóru eftir, gav ein av hesum mál. Bárður Mortansson sendi Andrew avstað í høgru, og eftir at hava rundað Bjarna, kundi hann staðfesta stórsigurin.

Hetta tók seinastu orkuna úr VB liðnum, og einastu skreytirnar, sum teir framdu, tað sum eftir var, var tá Milan fyri aðru ferð nýtti álbogan í nærdysti, og harvið fekk næsta gula kortið.

### Tríggjar orsøkir

Samanumtikið kann sigast, at dysturin varð avgjørdur av trimum orsøkum.

- HB liðið spældi nógv meira beinleiðis og ágangandi enn higartil í ár, kanska eisini orsakað av, at allir fýra á miðvøllinum nú vóru bóltspælarar ístaðin fyri bóltflytarar.

- VB venjarin framdi ein taktiskan brølara av teimum stóru, tá hann valdi at royna seg við flataru verju móti kvika HB álopinum.

Andrew av Fløtum: Hóast hann kanska kundi fingið eini tvey mál afturat, so sýndi hann rættuligt máltev, og arbeiddi hann meira fyri liðið enn hann hevur gjørt í langa tíð.

**HB-VB 6-2 (5-0)**

1-0: Andrew av Fløtum 11.
2-0: Jón Rói Jacobsen 19.
3-0: Andrew av Fløtum 20.
4-0: Andrew av Fløtum 38.
5-0: Rúni Nolsøe 44.
5-1: Krzystof Popczynzki 54.
5-2: Milian Kulic (br.) 17.
6-2: Andrew av Fløtum 40.

Dómari: Niklas á Líðarenda

**HB:**
Bárður Johannesen – Jóhannis Joensen, Hans á Lag, Símun Eliasen, Janus Joensen – Hallur Danielsen, Rúni Nolsøe, Rói Árting, Pætur Dahl – Jón Rói Jacobsen, Andrew av Fløtum

**VB:**
Bjarni Johansen, Predrag Zivkovic, Janus Kjærbo, Eyðun Jacobsen, Jón Pauli Olsen – Tórður Holm, Michael í Lágabø, Palli Augustinussen – Krzystof Popczynzki, Robert Cieslewicz



# Verjurnar vóru sum opnahjallar

***Løgmanssteypið:** Hóast teir høvdu mist tveir lyklaspælarar, so megnaðu vágamenn at kroysta GÍ síðstu løtuna í Sarpigerði*



*Í yvirtíðini hevði Henning Jarnskor møguleika at økja um GÍ leiðsluna, men úr ellivu metrum sendi hann omanfyri málið*

*Mynd: Jonhard Hammer*

Um undirhald verður gjørt upp í málum, so var tað sera undirhaldandi í Sarpigerði Kristi himmalferðardag. Har vóru sjey mál, har vóru fleiri aðrar góðar royndir móti málinum, og í yvirtíðini sendi Henning Jarnskor úr ellivu metrum og upp um málið (brotssparkið varð dømt, tí Súni Olsen varð skumpaður í ryggin).

Í landskappingini eru taktisku bindingarnar ofta nógvar og strangar. Soleiðis var tað ikki hósdagin. Um FS Vágar var komið at halda tætt og harvið skapa sær eina góða útgangsstøðu undan seinna umfarinum, so vóru teir noyddir at saðla um beinanvegin.

Óli Hansen, sum annars tykist hava sera torført við at finna seg til sættis á GÍ liðnum, skoraði beinanvegin. Hann umsetti innlegg úr høgru til mál. Og fimm minuttir seinni økti Helgi L. Petersen, sum hevði lagt upp til fyrra málið. Pauli Jarnskor legði fríspark flatt innfyri úr høgru, og Helgi var fyrstur á við nærra stólpan.

Málini kundu boða frá stórsigri tl heimaliðið, men soleiðis myndaðist tað als ikki. Ungi miðvallarin í høgru hjá FS Vágum, Tór–Ingar Akselen, hevði beinanvegin sent í stólpan, og miðskeiðis í 1. hálvleiki bar til hjá vágamonnum.

Albert Ari Thomassen, liðformaðurin hjá FSV, sum stóð eina sterkast í myndini av øllum, steðgaði GÍ álopi, Birgir Joensen fekk bóltin aftanfyri miðstrikuna, hann sneiddi tveir av sær, spældi eitt tvey við Hannus Olsen, sum var staddur í vinstru, og tá Birgir var komin inn móti brotsteigarsamankomingini í vinstru smekkaði hann til. Bólturin tók báðar stólparnar í handara borði, áðrenn hann fór um strikuna. Ivaleyst eitt tað vakrasta málið sum nakrantíð er skorað í Sarpigerði.

Leivur Hansen, sum hevur vunnið vongverjaplássið í vinstru, nú Súni Olsen er settur at røkja sentralt miðvallarapláss, økti til 3–1. FS Vágar hevði horna, GÍ fór í skjótt mótálop, ungi Sjúrður Ellefsen, sum hevði miðverjuódnina, tá stóru stopparnir vóru frammi, legði ikki bóltførandi mótstøðumannin niður, og so var Leivur Hansen leysur í vinstru. Hann setti ferð á móti málinum og smekkaði flatt inn við nærru stólparótini.

### Undirmannað FSV var væl við

Gestirnir góvust ikki, og 2. hálvleik áttu teir stóran heiður av. Birgir Joensen setti beinanvegin spenning í aftur. Albert Ari Thomassen vann bóltin i vinstru, spældi flatt í brotsteigin, har vandamikli og sterki framherjin tamdi og snaraði runt seg sjálvan, meðan fýra mótstøðumenn hugdu at. Bólturin tók handaru stólparótina, áðrenn hann fór um strikuna, og so var rættuliga spennandi aftur.

Tá Helgi L. Petersen bara lítla løtu seinni økti til 4–2, var tað – akkurát sum tá málini komu í 1. hálvleiki – staðfesting av, at sjálvt um vágamenn hava keypt nógvar útlendingar til at styrkja miðverjuna, so er tað har, at teir hava størstu trupulleikarnar. Pauli Jarnskor stakk fram eftir miðásinum, Helgi, sum var eyðsýndur í leysa leiklutinum sum fremsti miðvallarin, sneiddi tveir av sær og var púra leysur við málverjanum, tá hann skoraði.

Vágamenn komu enn eina ferð afturíaftur. Kim Poulsen, sum spældi 2. hálvleik fyri dugnaliga miðvallaran í høgru Tór–Ingar Akselsen, sum noyddist at taka seg burturúr, fekk tak á langari sending fram í vinstra borð, og dómarin metti GÍ verjuna at gera brotsspark. Dómurin var ógvuliga tunnur, men skotinum hjá John Johansen bilti einki. John var fínur í álopinum í 1. hálvleiki. Í 2. hálvleiki spældi hann í miðvallarplássinum í høgru, har Tór–Ingar Akselsen hevði verið undan steðginum.

### Lítil munur

FS Vágar er niðast á støðutalvuni í landskappingini, men tað er væl hugsandi, at teir fara at røkka finaluni í steypakappingini. Verjuparturin er ikki nóg góður og avgjørdur, men í framrættaða spælinum hekk væl saman hjá teimum. Sjúrður Ellefsen og Tór–Ingar Akselsen funnu væl saman í høgru. Jónsvein Olsen bjóðaði seg altíð til í vinstru, men tað var ein veikleiki, at vágamenn ikki megnaðu at skifta tvørturum úr høgru, tá teir myndaðu álop.

GÍ er miðskeiðis á støðutalvuni, men avrikið hósdagin – serliga 2. hálvleik vóru teir ússaligir – boðaði ikki frá, at teir eru upplagt evni til oddasess. Tað skal takast við, at móti FS Vágum var Magni Jarnskor sjúkur, Jóan Petur Olsen er skaddur, og Poul Ennigarð var ikki komin heim av flatlondum.

Hvat av liðunum skal í finaluna verður avgjørt í Sørvági 2. hvítusunnudag. Hvítusunnuaftan hittast liðini bæði í landskappingini í Sørvági!

JH

**GÍ–FS Vágar 4–3 (3–1)**

1–0: Óli Hansen 9.
2–0: Helgi L. Petersen 15.
2–1: Birgir Joensen 23.
3–1: Leivur Hansen 30.
3–2: Birgir Joensen 50.
4–2: Helgi L. Petersen 53.
4–3: John Johansen br 61.

**GÍ:**
Sunvard Joensen – Rúni Justinussen (Áslakur R. Petersen, 85.), Bartal Eliasen, Martin Thomsen, Leivur Hansen – Hans Pauli Petersen, Helgi L. Petersen, Súni Olsen, Pauli Jarnskor, liðformaður – Óli Hansen (Pól Henning Jacobsen, 85.), Henning Jarnskor
Gult kort: Bartal Eliasen, Martin Thomsen

**FS Vágar:**
Remi Mikotionis – Sjúrður Ellefsen, Darius Magdisauskas, Zilva Sudis, Rimvadis Bakus – Tór–Ingar Akselsen (Kim Poulsen, 46.), Hannus Olsen, Albert Ari Thomassen, liðformaður (Emil Hentze, 82.), Jónsvein Olsen – John Johansen, Birgir Joensen

Gult kort: Darius Magdisauskas

Reytt kort: Birgir Joensen 75. (tvey gul)

# Betra startin

***Kappróður:** Róðrarfólkið var síðsta leygardag á skeiði saman við startdómarum og høvuðsdómarum*

Í fjør gingu tað meiri enn fýra tímar frá tí, at kappróðurin á norðoyarstevnu sambært skránni skuldi starta, og til síðstu bátarnir komu á mál.

Allir partar vóru á einum máli um, at hetta skuldi ikki endurtaka seg. Fundur var millum lokalu fyrireikararnar og Róðrarsambandið, og formaðurin í RSF, Hannis Joensen, heldur, at teir eru so væl fyri hesa ferð, at líkindi eru fyri, at tað skal bera til at fáa róðurin frá hondini upp á væl styttri tíð enn í fjør.

– Veðurlíkindini fáa vit einki gjørt við, men sambært forsøgnini fara veðurumstøðurnar at verða góðar undir kappróðrinum, so tað er hugaligt. Klaksvíkingar halda, at síðsti túrurin undan róðrinum hjá skipunum, sum sigla um Leirvíksfjørð, er í so tætt uppat kappróðrinum, men teir siga eisini, at skipararnir hjá Strandferðsluni hava sagt, at tað fer at bera væl til hjá teimum at koma á vánna, sjálvt um fasti starturin er lagdur út.

Eitt annað lið, sum tey seinnu árini fleiri ferðir hevur longt um kappróðrartíðina, er, at tað í fleiri kappingum hava verið fleiri bólkar. Soleiðis verður tað ikki á norðoyarstevnu. Hámarkstalið, sum RSF vanliga nýtir, er seytjan. Tað eru seytjan ringar í fasta startinum. Størsta luttøkutalið á norðoyarstevnu er í kappingini millum 5–mannafør við gentum. Har er talið seytjan.

### Betri fastur startur

Leygardagin í síðstu viku hevði Róðrarsambandið eitt lítið skeið fyri róðrarfólkunum:

– Vit sendu boð eftir tveimum umboðum fyri hvørja manningina. Uppmøtingin var ikki eitt hundrað prosent, men hon var stak góð. Startdómararnir og høvuðsdómararnar høvdu møguleika undir friðarligum umstøðum og uttan tann spenningin, sum er í luftini, tá tað snýr seg um kapping, at tosa við og greiða róðrarfólkunum frá, og so svaraðu teir eisini spurningum. Eg haldi, at hetta var sera læruríkt og harvið gagnligt fyri FM kappingina, sigur Hannis Joensen.

Formaðurin í RSF greiðir eisini frá, at teir leygardagin nýttu høvið at vísa róðrarfólkunum, hvussu tann betraða útgávan av fasta startinum riggar. Tað gjørdu teir við Sílinum, sum teir høvdu fingið niðan á parkeringsøkið, sum er rundanum húsini hjá ÍSF í Gundadali:

– Vit hava útviklað startin í samráð við gummibátatænastuna. Higartil hevur stóri trupulleikin verið, at tað hevur staðið so nógv á hjá róðursmanninum, sum hevur hildið í ringin. Um tað hevur verið eitt lítið lot, so eru bátarnir farnir tvørir. Nú hava vit roynt at byrgja uppfyri hesum. Stýrimaðurin skal ikki longur halda í ringin. Í staðin verður ein slippkrókur settur í stokkin. Hol verða borað í báðar stokkarnar – einar 70 cm fram frá rongini. Hvørju megin tað verður sett fast, veldst um ættina. Tá tað verður rópt klárir, og skotið brestur, skal stýrimaðurin sleppa gummibeininum, sum hann heldur í, og so er leyst. Vit vóna og rokna við, at hetta fer at betra um fasta startin, sigur Hannis Joensen.

Startdómarar á norðoyarstevnu verða Hallur Ellingsgaard og Jákup Sørensen, sum hava havt uppgávuna í mong ár. Høvuðsdómarar verða Gunnbjørn Joensen og Andrass Nybo.

JH

# Súkkling í Klaksvík

*Saman við stevnunum byrjar árliga Grand-Prix kappingin hjá súkklarum*

Komandi vikuskiftið verður hol sett á føroyska kappróðraárið, og samstundis eisini tí afturvendandi Grand Prix Súkklukappingina, ið Tórshavnar Súkklufelag skipar fyri. Kappingin fylgir FM róðrinum, og á hvørjari stevnu verður koyrt undan kappróðrinum.

Koyrt verður Býarkoyring, har koyrt verður runt á økinum frá Norðoya Sparikassa, eftir Skúlavegi, eftir Gerðagøtu og aftur á Biskupstøðgøtu. Hesin teinur verður koyrdur í 50 minuttir og eitt umfar aftrat. Børn og ung sleppa eisini at royna seg, og eisini tey koyra á sama teini, men tó ikki so langt sum tey vaksnu.

Sum skilst, so eru súkklararnir fegnir um teinin, sum er sera væl egnaður til endamálið.

Kappingin hjá teimum vaksnu og hjá unglingum byrjar kl. 13.30, meðan børnini byrja kl. 14.30.

Heiðursmerkir verða latin til nr. 1, 2 og 3.